# ftir altjóðagerðini



tískil hevur tað verið ómetaliga torført at ávirka og stýra sterku altjóða marknaðarkreftunum. Vit hava í dag tvær stovnar, sum eftir mínum tykki, kunnu geva altjóða marknaðarkreftunum veruligt mótspæl. Hesir stovnar eru ES og ST, men skal tað eydnast, er neyðugt við umfatandi reformum av báðum stovnum.

Formaðurin í svenska Javnaðarflokkinum væntar kortini, at politikararnir fara at fáa betri møguleika at ávirka altjóða marknaðarkreftirnar í framtíðini. Hann væntar, at regionalu felagsskapirnar fara at fáa ein avgerandi leiklut í framtíðini.

– Eg vænti, at ES, Mercusur í Suðuramerika, NAFTA í Norður Amerika saman við felagsskipaninum í Asia og Afrika fara at fáa ein enn týdningarmiklari leiklut í framtíðini. Hesir stovnar fara at tryggja, at vit politikarar fáa betri møguleika at stýra altjóða marknaðarkreftinum, sigur hann.

Hjartabarnið hjá Javnaðarflokkum í serliga Norðanlondum, vælferðarstaturin, er eisini í eini broytingartíð. Heldur enn at góðtaka tungar almennar skipanir, sum mangan ikki seta borgaran í miðdepilin, seta borgarar í dagsins samfelag krav um ávirkan og frælsi til at mynda sín egna gerandisdag. Hvussu heldur tú vælferðarstaturin skal laga seg til alheimsgerðina?

– Ja hatta er ein rættiliga stórur spurningur. Eftir mínum tykki hevur tað ongantíð verið so stórur tørvur á einum vælútbygdum vælferðarsamfelagið sum júst nú. Kjarnin í vælferðarskipanini hevur altíð verið tryggleiki í broytingartíðum. Skalt tú fáa fólk at satsa og fáa úrslit, mugu tey hava tryggleika. Hevur tú ikki okkurt slag av tryggleika, ført tú passivar borgarar, og við passivum borgarum ført ongan búskaparligan vøkstur. Alheimsgerðin hevur við sær, at broytingar fara fram hvønn dag, og tí er vælferðarstaturin gullverdur í hesum tíðum, vísir hann á.

## Lata upp enn meir

Innflytaraspurningurin er uttan iva eitt av heitastu politisku evnunum, sum hevur tikið seg upp seinastu árini í Evropa. Serliga hevur orðadrátturin um innflytarar verið harður í londum sum Hollandi, Fraklandi, Eysturríki og Danmark.

Sonevndu høgra populistisku flokkarnir hjá Pim Fortyin, Jean Marie Le Pen, Jørg Haider og Piu Kjærsgaard hava veruliga fingið byr seinastu árini, og rákið tykist at vera, at borgarar í fleiri evropeiskum londum ynskja at steðga innflytingini.

Tað er einki dulsmál, at javnaðarflokkar í Evropa hava havt torført við at finna fótafestið í innflytaraspurninginum. Søguliga hevur humanisma, tollyndi og virðing fyri mannarættindum verið kjarnumál hjá Javnaðarflokkum, men tað hevur verið torført at hildið fast í hesum súlum, tí mótstøðan í flestum londum hevur havt við sær, at Javnaðarflokkarnir hava verið noyddir at endurskoða henda politikk.

Spurdur, um tað ikki bert er ein spurningur um tíð, áðrenn javnaðarflokkarnir í Evropa verða noyddir at geva eftir trýstinum frá borgarunum, ið ynskja at steðga innflytingini, svarar Gøran Persson:

– Tað er ómetaliga týdningarmikið, at vit ikki hokna undir trýstinum frá teimum konservativu kreftum, sum ikki sýna tollyndi og í mongum førum ikki virða altjóða sáttmálar um mannarættindi. Vit skulu hinvegin halda fast í okkara politikki, sum leggur upp til tollyndi og mentanarligum fjølbroytni. Spyrt tú meg, haldi eg at vit skulu lata okkara lond enn meir upp. Gongdin í Evropa er, at íbúgvaratalið minkar, og tí hava vit tørv á innflytarum fyri varðveita tænastustøðið.

Formaðurin í svenska Javnaðarflokkinum fortelur, at støðan í Svøríki í innflytaraspurninginum er grundleggjandi øðrvísi enn í øðrum evropeiskum londum.

– Vit í Svøríki hava tikið móti flest innflytarum. Hóast ein framsøknan politikk á innflytaraøkinum, fær stjórnin javnan atfinningar fyri ikki at lata fleiri innflytarum inn. Talan er sostatt um øvugtan trupulleika sammett við flest øll onnur lond í Evropa, sum vilja steðga innflytingini. Eg takki fyri, at eg stýri í einum landi sum Svøríki, tí nógvir av mínum starvsfeløgum hava júst øvugtan trupulleika, sigur Gøran Persson.

## Vítt til veggja

Fyrrverandi svenski forsætisráðharrin, Olof Palme, sum varð myrdur í 1986, hevði í mong ár ein dreym um eitt sosialt reytt Evropa, sum var savna um javnaðarhugsjónina. Hesin dreymur er kortini ongantíð blivin veruleiki, hóast nógvir Javnaðarflokkar hava sitið við valdinum í Evropa.

Seinast í nítiárunum vóru heili 11 javnaðarstjórnir í teimum í alt 15 limalondunum í ES. Hóast javnaðarleiðararnir formelt hava sama flokslit eru kortini rættiliga vítt til veggja, hvørji sjónarmið teir ymisku flokkarnir standa fyri. Javnaðarleiðararnir í Bretlandi og Týsklandi, Tony Blair og Gerhard Schrøder, verða vanliga bólkaðir at vera rættiliga liberalir javnaðarmenn, meðan Lionel Jospin og Gøran Persson í ávikavist Fraklandi og Svøriki vanliga vera flokkaðir sum rættiliga vinstravendir.

Spurdur, um tað ber til at tosa um eitt felags evropeiskt javnaðarprojekt, tá munirnir millum flokkanir eru so stórir, svarar Gøran Persson:

– Tú ert noyddur til at minnast, at hvør javnaðarflokkur er noyddur at fyrihalda seg til nationala politikkin og ikki bert tann internationala. Hyggur tú eitt nú eftir Labour, so hevur Ongland havt konservativar stjórnir í eini 70 ár av seinastu 100 árunum, og hetta setur ein karm fyri, hvussu tú sum flokkur kann skipa eitt samfelag. Tað sama kann sigast í Svøríki. Hevði ein borgarligur flokkur fingið ræðið í Svøríki, so hevði hann á sama hátt verið noyddur fyrihalda seg, at ein Javnaðarflokkurin hevur rátt fyri borgum í meginpartinum av tíðini, sigur hann.